# Heri Lava Olsen 35 ár í svimjihylinum



*Tey fýra, sum vórðu heiðrað í Svimjihøllini í Havn í morgun: Heri á Lava Olsen, leiðari, sum hevur verið í starvi í góð 35 ár og Jóhan Jacobsen, Rúna Mortensen og Helena Mortensen, sum hvør sær hava verið í starvi í 20 ár*

*Myndir: www.torshavn.fo*

**Á nýggjárinum leggur Heri á Lava Olsen frá sær sum leiðari í Svimjihøllini í Havn. 1. Mai í ár hevði han 35 ára starvsdag, og í hesum sambandi varð hann heiðraður á samkomu í Svimjihøllini í morgun**

MERKISDAGUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Heri á Lava Olsen varð settur í starv sum lívbjargari í gamla Svimjihylinum í Gundadali í Havn tann 1. mai í 1973. Á nýggjárinum leggur hann frá sær eftir sløk 36 ár í starvi – harav góð 23 ár sum leiðari.

Tað var tá Ivan Carlsen, sum var fyrri leiðarin í Svimjihylinum og seinni í Svimjihøllini, doyði í 1985, at Heri á Lava Olsen tók við sum leiðari. Soleiðis hava bert tveir leiðarar verið í Svimjihylinum/høllini í Havn, síðani hylurin í Gundadali varð tikin í nýtslu á ólavsøku í 1959.

Heri á Lava Olsen hevur sostatt starvast í gamla hyli, har sum Badmintonhøllin er í dag, og síðani í Svimjihøllini í Gundadali uttan slit í 35 ár.

Freistin at søkja starvið sum leiðari var úti mánadagin, og nýggi leiðarin tekur við í Svimjihøllini í Gundadali á nýggjárinum. Í Svimjihøllini starvast 12 fólk í føstum starvi og átta avloysarar.

Kelda: www.torshavn.fo



*Ein av føstu »morgunfrúunum« í Svimjihøllini í Gundadali í Havn, 90 ára gamla Ása Michelsen, heilsar upp á fráfarandi leiðaran, Hera á Lava Olsen*



*86 ára gamli Sverri Mortensen á Argjum hevur í mong harrans ár verið fastur fúsur í Svimjihylinum. Hann bara eisini fram nøkur orð á hátíðarløtuni í morgun*

Sony Ericsson G502i

Jólagáva til undirhald

Fartelefon við flest øllum hentleikum, so sum 3G, 2MP myndatóli, Bluetooth, 32MB minni, møguleika fyri at byggja minni út við M2 korti, FM-útvarpi og TrackID music recognition. Battarí: 10 tímar talutíð og 340 tímar standby. Phonearena gav hesari telefonini 8 stig av 10 møguligum í test tann 05-06-2008.

Les meira á vodafone.fo
Vit eru eisini til tænastu á 202020.

kr. 1395
Vanligur prísur 1.595,-

Løtan er tín



vodafone

FAKTA

### Svimjihøllina í Gundadali

Svimjihøllin í Gundadali lat upp í 1982. Har eru fýra hyljar. Tveir barnahyljar, ið eru 29-30 stig, ein 25 metrar langur hylur og ein kavingarhylur. Í hesum báðum hyljunum er hitin 26,5 stig.

Svimjihøllin hevur gosbað og seks sólir.

450-500 fólk vitja hvønn dag. Munandi fleiri vitja um summarið, tá opið er allan dagin. Tá vitja 650-800 fólk um dagin í Svimjihøllini í Gundadali.

Um jólini er stongt hesar dagar: jólaaftan, jóladag, 2. jóladag, gamlaárskvøld og nýggjársdag.

Búmerkið, ið sæst á vegginum uttanfyri, ímyndar ein svimjara á alduryggi. Ole Wich gjørdi snøgga búmerkið úr flamingo til eina svimjikapping í 1987.
Svimjigentuna, ið er standmynd uttan fyri Svimjihøllina, gjørdi Hans Pauli Olsen í 2006.

*Kelda: www.torshavn.fo*

## Rundir starvsdagar í Svimjihøllini

Umframt Hera á Lava Olsen vóru trý onnur starvsfólk heiðra í Svimjihøllini í dag fyri drúgva tænastu. Tey eru Jóhan Jacobsen, Rúna Mortensen og Helena Mortensen, sum øll hava 20 ára starvsdag. Heðin Mortensen, borgarstjóri, heiðrað tey á samkomu í Svimjihøllini í morgun.